Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Nr. 86/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um at gjalda fyritøkum fyri framt arbeiði á Glasi, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hava fyritøkur, ið vórðu bidnar av Landsverki um at fremja ymiskt arbeiði til tess at gera Glasir lidnan, fingið gjald fyri sítt arbeiði?

2. Um svarið er noktandi, hvør er tá orsøkin?

3. Nær kunnu fyritøkurnar rokna við, at goldið verður fyri arbeiðið?

4. Hvørjar avleiðingar metir landsstýrismaðurin, at gongdin hevur havt fyri serliga smærri fyritøkur?

5. Hvat fer landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at rættartrygdin er vard hjá fyritøkum, ið ikki eiga lut í mongu sakunum millum Landsverk og sáttmálapartarnar í hesum drúgva byggimáli?

Viðmerkingar:
Eftir at Glasir varð gjørdur liðugur og handaður landsstýrinum í august 2018, hevur verið eitt langt og drúgt eftirspæl av byggingini, og tað hevur fingið bæði stórar politiskar avleiðingar og starvsligar avleiðingar á Landsverki. Politiska skipanin hevur viðgjørt og fer uttan iva frameftir at viðgera hetta byggimál, ið røkkur um fleiri samgongur.

Eitt, ið tó lítið hevur verið frammi, er støðan hjá teimum fyritøkum, ið vórðu bidnar um at gera ymiskt arbeiði fyri Landsverk, til tess at fáa Glasir lidnan.

Í Dimmalætting hevur í ár onkur arbeiðstakari á smærri fyritøku verið frammi og víst á, at enn er ikki goldið fyri arbeiði, sum varð gjørt í 2018.

Til tess at fáa greiði á støðuni, og hvat verður gjørt í málinum, verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 15. mai 2020

Høgni Hoydal